## Systkin fingu barn

Eini systkin í Norðursælandi vóru í dag í rættinum í Helsingør, har tey vóru ákærd fyri blóðskemd. Tey bæði búðu saman í Týsklandi í 2005 og 2006, og á heysti í 2006 fekk systirin eina dóttir, sum beiggin vísti seg at vera pápi at. Helene Kølbek, ákæri, ásannar fyri Helsingør-Posten, at málið er sera sjáldsamt í Danmark. Hon sigur, at systkini eru ákærd eftir grein 210 í revsilógini, sum gevur upp til tvey ára fongsul. At bæði eru ákærd merkir sambært blaðnum, at tey hava verið samd um ta kynsligu samveruna.



## Íslendska arbeiðsloysið 8,9%

Arbeiðsloysið í Íslandi er ikki vaksið so nógv tær seinastu vikurnar sum fyrr í ár. Tey seinastu tølini vísa, at arbeiðsloysið var 8,9 prosent seinasta mánaðarskiftið. Ein mánað frammanundan var tað 8,2 prosent. Hagstovan í Reykjavík væntar lítlan vøkstur í arbeiðsloysinum í apríl, og tí verður mett, at arbeiðsloysið verður millum 8,9 og 9,3 prosent síðst í hesum mánaðinum. Tølini hjá Hagstovuni vísa, at í meðal vóru 14.565 fólk arbeiðsleys fólk arbeiðsleys í mars ella 1.270 fleiri enn í februar. Til sammetingar kann nevnast, at um hesa tíðina í fjør vóru 1.674 íslendingar arbeiðsleysir.

# Færri sjúklingar av landinum

**Ein av broytingunum, sum skal gerast við føroyska sjúkrahúsverkið er, at tað nú skulu færri sjúklingar av landinum. Ella tað skal í hvussu so er ansast betri eftir, hvør fer av landinum. – Tað er sjálvandi vandi fyri, at viðgerðin verður verri, men tað er hesum vit skulu ansað eftir, staðfestir Hans Pauli Strøm, heilsumálaráðharri**

SJÚKRAHÚSVERK
*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*



*- Der skal være en plan, var nakað tað fyrsta Bente Wennerberg, menningarstjóri, segði við Rás2, eftir at hon var presentarað í sínum nýggja starvi. Sambært Hans Paula Strøm, landsstýrismaður, verða hennara royndir ein stórur fongur fyri føroyskar heilsuverkiðØ*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

Broytingarnar, ið skulu gerast á Landssjúkrahúsinum, eru rættiliga nógvar, men broytingin, ið sjúklingar helst koma at merkja best á kroppinum, er, at tað ikki longur er ætlanin at senda sjúklingar til Danmarkar fyri eitt gott orð.

Hóast Hans Pauli Strøm, landsstýrismaður, sigur seg kenna til vandan, ið kann íkoma, við at sjúklingarnir kanska ikki fáa bestu viðgerðina.

- Hinvegin er ætlanin at fáa fleiri serlæknar til Føroyar í styttri tíðarskeið, so øll í eini grein kunnu fáa viðgerð í senn. Meiningin er samskipa hetta væl, umframt, at tað kann geva ein betri umhvørvi til læknar í Føroyum, metir landsstýrismaðurin.

### Strategiskur leiðslubólkur

Handan hetta tunga orð er eisini ein partur av ætlanini við at broyta bygnaðin, tá fólk skulu viðgerast. Bólkurin er mannaður av bæði sjúkrarøktarfrøðingum, stjórum og læknum, og ætlanin er sambært heilsumálaráðnum, at tað skal gerast styttri millum fígging og viðgerð.

- Vit hava sett hetta ráðið, fyri at serkunnleikin skal hava møguleika at avgera, hvussu viðgerðirnar skulu fremjast, men tað hevur eisini verið soleiðis, at vit hava styttri millum viðgerð og fígging. Tað er millum annað har, at Bente Wennerberg, menningarstjóri, skal vera við. Soleiðis, at vit fáa fleiri heimtøkur, sigur Hans Pauli Strøm.

### Eina ætlan

Bente Wennerberg er nú menningarstjóri í sjúkrahúsverkinum, og hon hevur verið tengdat sjúkrahúsinum í eina tíð, og hevur nógvar royndir innan starvsfólkamenning.

- Mín allarfyrsta uppgáva er at gera eina ætlan, staðfestir Bente Wennerberg, sum óiva saknar eina veruliga ætlan í sjúkrahúsøkinum

Hon er tó við gott mót, og heldur seg hava nóg mikið at tríva í, og dugir at síggja stórar møguleikar innan viðgerð í Føroyum.

### Kostar pengar

Vár í Gong, forkvinna í felagnum føroyskir sjúkrarøktarfrøðingar, staðfestir, at tað ikki bara verða serlæknar, ið skulu til Føroyar, ið koma at kosta.

- Eg vóni bara, at tey hava tikið við í roknistykkið, at skulu fólk viðgerast í Føroyum, sum í løtuni verða viðgjørd uttanlands, so mugu vit eisini hava skipanir í Føroyum, sum til dømis sjúkrarøktarfrøðingar við røttum útbúgvingum,

**FAKTA**

**Børnini við nógvum nøvnum**

Nakrar navnabroytingar fara eisini fram, nú bygnaðarligar broytingar verða gjørdar í sjúkrahúsverkinum. Sjúkrarøktarstjórin og læknastjórin eita nú varastjórar, men funktiónin er júst tann sama. Harumframt eita leiðararnir á sjúkrahúsunum í Suðuroy og í Klaksvík ikki longur umsjónarmenn, men sjúkrahússtjórar.

Somuleiðis er Bente Wennerberg sett sum menningarstjóri. Hetta er eitt nýtt starv.

# Sjúkrarøktarstjórin sett

**Í gjár varð greitt frá, at Naina Túgvustein verður varastjóri á Landssjúkrahúsinum. – Tað er gleðiligt, at onkur er komin í handan sessin, ið hevur staðið tómur ov leingi, sigur Vár í Gong, forkvinna í felagnum føroyskir sjúkrarøktarfrøðingar**

SJÚKRAHÚSVERK
*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*



*Naina Túgvustein er nýggjur fyribilsvarastjóri á sjúkrahúsinum. Tað fyrsta hon skal gera, er at fáa lagt feriuna til rættis á sjúkrahúsinum*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

Sjúkrarøktarfrøðingafelagið fegnast, nú ein fyribilssjúkrarøktarstjóri er sett. Hon er tó ikki longur sjúkrarøktarstjóri, men varastjóri, tí ein navnabroyting er farin fram, men uppgávan er framvegis tann sama.

- Tað er gleðiligt, at onkur er komin í handan sessin, ið hevur staðið tómur ov leingi, sigur Vár í Gong. Hon vísir tó á, at enn er ov tíðliga at siga ov nógv um nýggja bygnaðin, tí hann er so nýggjur, og vit enn ikki hava sæð avleiðingarnar av honum.

### Tikin upp á ráð

Nógv stríð hevur verið um júst hendan sessin, og Vár í Gong vísir á, at tað ongantíð hevur verið ætlanin hjá felagnum at vera áloypandi, men at tey hava kent seg eitt sindur uttanfyri ætlanirnar, og tí vóru tey kedd av.

- Nú sær út til, at aðrir bollar eru komnir í suppuna, og vit hava eisini fingið at vita at verða aðrar broytingar gjørdar, so verða vit upplýst um tað, umframt, at vit hava fingið at vita, at starvið verður lýst leyst. Men vit anda ikki lættan, fyrr enn ein persónur er fastsettur í hatta starvið, sigur Vár í Gong.

Somuleiðis greiðir hon frá, at tað vóru gomlu ætlanirnar við bygnaðinum, sum nú eru sleptar, ið vóru ein trupulleiki.

### Navnabroyting

Vár í Gong hevur heldur onki ímóti, at navnabroytingar eru gjørdar innan bygnaðin.

- Um hetta kann gera samstarvið betri, og hava við sær, at fólk kenna seg betri í leiðsluni, so síggja vit tað bara sum ein fyrimun, sigur Vár í Gong. Hon leggur afturat, at ein onnur orsøk til, at tey kunnu góðtaka hesa ætlan er, at hetta er leiðslubygnaður, ið eisini verður nýttur í øðrum londum, har tað vísir seg at fungera væl.

Hon greiðir somuleiðis frá, at tey sum heild eru spent uppá hendan nýggja bygnaðin, men at tað enn er ov tíðliga at staðfesta, um hann er ein fyrimunur ella ein vansi.